14. Oktober 1989 Neistin

Gesturin

Koyr referatini burtur



Íróttaskrivingin í bløðunum hevur ment seg nógv seinastu árini.

Kanska serliga síðani 14. September gavst við mánadagsbløðnum hava hini bløðini sær, at har liggur ein marknaður opin.

Fólk eru sett burturav at taka sær av íróttinum á sunnudøgum bløðunum, og fyri okkum, sum hava áhuga fyri so at siga øllum írótti, men ongan møguleika hava at siggja alt, er hetta eitt stórt framstig.

Eina broyting kundi eg tó hugsa mær í skrivingini, gerst við at referera dystirnar.

Tað eru mong íðsham íróttarpressan í Danmark gevur við ti. Flestu bløðini hava bert hagtøl frá sjálvum dystinum, og bruka so pláss og tíð uppá at fortelja um aktørarnar (spælararnar).

At fáa persónarnar fram í bløðunum ger tað nógv meira áhugavert at lesa.

Lat fyrst og fremst stívarp og sjónvarp taka sær av sjálvari frásøgnini. Eru tey íðsham ikki til staðar, so brúka heldur ikki tíðina og plássið til frásagnirnar.

Tá íð og sjálvur seinast í sjeytti og fyrst í áttati árunum arbeiddi við íróttí á danska bløðnum BT var tað hamfrest at koma við frásagnum frá einum dysti.

Tað kundi kanska gerðast frá onkrari serligari hending í dystinum, men tað blev gjørt við at lata tey ella tann, sum vóru við í hendingini greiða frá.

Viðmerkingar frá luttakarunum stutt eftir dystin er altíð gott tilfar.

Tað hevði verið stuttligt við tilkum rovdum í Føroyum. Tí kundi hondbóltur, flogbóltur og borðtennis tá, eisini gjørt spennandi at lesa um.

Árni Gregersen

Jóannes Jakobsen, liðskipari

Fult uppiborið



Jákup Joensen, B71:



Seinna málið avgjørdi dystin

Jákup Joensen, vinstri vongverji hjá B71, forerdi HB bóltin, tá seinna málið kom.

Hvat hendi har, Jákup?

J.J.: — Vit høvdu tamarhald á situatiónini. Ei

sum so, bara peng-ar/atkvøður liggja eftir!

Tíbetur eru føroysku bløðini yvirhøvir - mær kunnugt - ikki komin langt útí hettar, at seta beinleiðis krøv til sjálva ítróttarskrivingina, - eitt nú at hon skal leggja seg meira eftir persónum, so hon kann selja meira (ein grundin kann vera, at júst tað kann geva politiskan baksláttur í einum lítlum samfelag sum tí føroyska, verður tað ikki gjørt við skili (t.e. í summum førum: uttan tað rætta politiska fyrilitið!).

Ítróttarteigarnir, sum vit kenna teir frá eitt nú donsku bløðunum, eru rætt og slætt poppkvørnir: málið verður, so birt verður upp undir forvitnið eftir hendingum, ið einki hava uppá seg og sum hava lítið við aðaltáttin í ítróttini at gera.

Tá føroyskir bladútgevarar sjálvir ikki krevja tað, so er tað harmuligt, at eitt ynski um meiri persónsbundna skriving verður ført fram av einum tíðindamanni, sum ikki hevur fíggjarliga ella politiska ábyrgd av nøkrum blað, t.v.s. einum, ið ikki hevur pengar og/ella atkvøður sum motiv.

Víst skal ítróttarskrivingin vera betri. Og her hava referatini sítt sjálvsagda pláss. Ikki av tí gamla slagnum, har sagt verður frá dystinum úr enda í annan. Ikki eitt objektivt ummæli, men eitt eftirfarandi ummæli, ið sigur frá *einum* upplivilsi av dystinum á ein livandi hátt, ið gevur eina hylling á, hvussu leikur fór frá byrjan til enda, og eitt sjónarmið um, hví dysturin spældi av sum hann gjørdi. Stutt sagt: eitt *lesiupplivilsi* bæði fyri tey, ið hava sæð dystin og tey, ið ikki hava.

Samrøður við einstaklingar fáa tá eitt lítið pláss, hóast tær nýtast ikki at verða útihýstar; mest eiga tær at vera nýttar, tá tað ikki eru lið ið kappast (borðtennis, badminton, golf (!) o.l.).

Harumframt skal nógv størri dentur leggjast á at fáa úrslit til vega heilt niður í lægstu deildirnar, meira skal gerast burturúr yngru deildunum yvirhøvir, og á tað virksemið, ið fer fram í felǫgunum.


Her hava samrøður við einstaklingar sítt sjálvsagda pláss.

All hettar krevur nógv størri samstarv millum felǫg, fjølmiðlar o.o. enn vit kenna í løtuni.

Og so er ikki minst umráðandi at meta allan føroyska ítróttarheimin kritiskt, - eftir mínum tykki soleiðis at peningajáttanir til ítróttarvirksemi og virksemið sjálvt leggur seg eftir at gera ítróttin til nakað, ið stendur *øllum* í boði.

Fær viðkomandi blað/flokkur meira burturúr slíkari skriving, so gjarna fyri mína skyld! Tað er ikki so at skilja.

Tang á Toftir



Tað letur til, at B 68 hevur evnini til at fáa frægar kreftir áhugaðar at koma hendan vegin. Tað liggur á lóði, at felagið hevur samráðingar við danan Jens Tang Olesen, venjaran hjá B 1913.

B 1913-venjarin verður roknaður sum eina av best kvalifiseraðu venjarunum í Danmark og var nøkur ár herfyri kosin "Ársins venjari" í Danmark.

Ein annar, B 68 hevur havt í telefonini, sigst vera fyrrverandi finski landsliðsvenjarin, sum í ár hevur vant danska liðið B 1903.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa tíðindini váttaði áðrenn blaðið fór til prentingar.



Arnbjørn Sivertsen

Bridge

Í mótspælinum er týdningurin av at markera longd í liti stórur. Viðspælarin hevur tørv á allari ti hjálp, hann kann fáa, fyri at vita, hvussu kortini sita. Tað er altíð keðiligt, tá spælskiparin sleppur at vinna ein útgang, 4 sp ella hj, tá tú og viðspælari tín kundu havt tikið fýra teir fyrstu stingirnar.

N/ Øll

Útspæl: Hj 8

	♠ A-K-10-5 ♡ J-2 ◇ Q-9-6-4 ♣ Q-8-7	
♠ ♡ ◇ ♣	N V E S	♠ 3-2 ♡ A-9-3 ◇ A-K-8-7 ♣ K-9-6-4
	♠ ♡ ◇ ♣	

V	N	E	S
-	1 rú	pass	1 sp
pass	2 sp	pass	4 sp
pass	pass	pass	

Eystur tók útspælið við essinum — Suður legði lágt. Undir rútarakong legði Suður dreingin og Vestur triuni. Fyrsti spurningur — hvat skal Eystur nú spæla?

Tað er møguligt men ikki sannlikt, at Vestur hevur spælt triuni frá doubleton, 3-2. Hinvegin man hann heldur hava spælt triini út frá 10-5-3-2 ella 10-5-3. Eystur metti, at kontraktin kundi ikki setast uttan so, at Vestur hevði kleyvara-ess og spældi ti kleyvarakong. Suður legði dreingin og Vestur fimmini. Eftir at hava kannað hesi kortini eina løtu spældi Eystur enn ein kleyvara. Hetta visti seg at vera óbøtiliga skeivt, ti kortini sótu soleiðis:

	♠ A-K-10-5 ♡ J-2 ◇ Q-9-6-4 ♣ Q-8-7	
♠ 8-4 ♡ 8-7-6 ◇ 10-5-3 ♣ A-10-5-3-2	N V E S	♠ 3-2 ♡ A-9-3 ◇ A-K-8-7 ♣ K-9-6-4
	♠ Q-J-9-7-6 ♡ K-Q-10-5-4 ◇ J-2 ♣ J	

Suður trumfaði tann seinna kleyvaran, tók trumf og kom sær av við rútararnar á borðinum, tá hann tók tann góða hjartaralitin á hondini.

Hvat hevði andstøðan gjørt skeivt?

Vestur gav viðspælara sínum skuldina, men mundi tað vera rætt av honum sjálvum at leggja fimmini undir kleyvarakong? — Vestur veit, at viðspælarin veit, at hann hevur kleyvara-ess. Tað vildi tí verið rætt av honum at boða frá longdini í litinum. Tann mest vanliga markeringin er, at høgt/lágt visir líka tal og lágt/høgt ólíka tal. Vestur skuldi tí lagt kl 2 undir essið og vist eitt ólíka tal í litinum. So hevði verið lættari hjá Eystri at roknað út, hvussu kortini sótu og funnið tað rætta framhaldið, nevniliga rútara-ess.